

## Kranjcar ávarar Ongland

Tað enska landsliðið skal ikki vænta sær ein løttan dyst móti Kroatia, ávarar Niko Kranjcar. Tað kroatiska liðið hevur tryggjað sær luttøku í EM-endaspælinum í Schweiz og Eysturríki, og kunnu tessvegna taka sær av løttum mikukvøldið í dystinum móti Onglandi. Men tað hava kroatar ongar ætlanir um at gera, um ein skal trúgva orðunum hjá Portsmouth leikaranum Niko Kranjcar. - Vit hava eina ábyrgd, at royna at vinna dystin. Ísrael hava víst, hvat ítróttur snýr seg um, tá teir vunnu ein dyst, har teimum ikki noyddist at vinna, og góvu alt hvat teir áttu móti Russlandi, sigur Kranjcar sambært BBC-5-Live. Ongland klárar seg við eittans stigi, men kroatar ynskja ikki at kapitulera og lata standa til, sigur landsliðsvenjarin, Slaven Bilic. - Eitt stig á Wembley er altíð eitt megnar úrslit, men vit kunnu ikki fara at spæla eftir einum javnleiki. Vit fara at gera alt í okkara makt fyri at umboða land okkara á ein fyrimyndarligan hátt, tryggjar landsliðsvenjarin.

# Frambrot fyri ítróttina

*(Kelda: Klaksvíkar Kommuna)*

**Leygardagin varð Badmintonhøllin tikin í nýtslu, og yngri sum eldri frøðast um frambrotið í Klaksvík. Heilt nógv fólk høvdu leitað sær í nýggju og snotuligu badmintonhøllina, tá hon varð tikin í nýtslu leygardagin 17. november**

ÍTRÓTTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*





*Nógv folk var komið saman til hátíðarhaldið í nýggju badmintonhøllini í Klaksvík.*

Dávur Winther, mentanarleiðari í Klaksvíkar kommunu beyð vælkomin og greiddi frá einari spennandi skrá.

Jákup Anthoniussen, ið er ein av stigtakarunum, tosaði síðan um, at hugskotið til høllina stavaði frá einum brúsupráti í fimleikarhøllini fyri nøkrum árum síðani. Jákup vísti á, at frá tí at fyrsti spakin varð settur í, og til høllin stóð klár, vóru bert 14 mánaðir gingnir. Hann takkaði øllum, ið hvør á sín hátt høvdu verið við í verkætlanina og tóktist ikki sørt rørdur.

Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen ynskti badmintonhøllini vælkomnari og frøddist um ítróttarøkið sum ein nýggjan kraftdepil í Klaksvík. Borgarstjórin helt fyri, at ætlanir eru um bæði at samanbinda tær tríggjar KÍ-, badminton- og svimjihøllina og byggja nýtt stadionøki eystanfyri svimjihøllina.

Mentamálaráðharrin, Jógvan á Lakjuni hevði tær søguligu brillurnar á og tosaði nógv um tann stóra týdningin, KÍ-høllin hevur havt fyri ítróttina í Klaksvík, síðan hon varð tikin í nýtslu í 1969. Høllin lat upp fyri heilt nýggjum møguleikum, eitt nú innandurafótbólti, badminton og vørumessum. Eisini hava samkomur nýtt høllina til møtir. Jógvan á Lakjuni ynskti síðani nýggju badmintonhøllini blíðan byr.

Ímillum tær mongu røðurnar, ið vórðu hildnar, sungu og spældu bæði kór og orkestur. Sangurin og spælið setti veruliga dám á løtuna.

Badmintonítróttin slapp sjálvsagt eisini upp í part. Fleirfaldi føroyameistarin í bæði single, double og mixed-double Sigrid Andreasen servaði fyrsta bóltin í badmintonhøllini. Sigrid var serliga eyðsýnd í 70'unum og fyrst í 80'unum. Síðani spældi núverandi føroyameistarin í single hjá monnum Niklas Eysturoy ímóti Tobiasi Effersøe, landsliðsvenjara og fyrrnevndi vann dystin.

Badmintonhøllin er eitt risa frambrot fyri ymsu ítróttargreinarnar í Klaksvík. Fleiri ítróttarfeløg hava keypt seg inní høllina. Flogbóltsfelagið Mjølnir, Rennifelagið Treysti, Hondbóltsfelagið Team-Klaksvík og Badmintonfelagið hava hølir uppi á svalanum. Sostatt kann sigast, at ítróttarfeløgini í Klaksvík hava fingið framúr umstøður at virka undir, og hetta fer óivað at síggjast aftur á ymsu sigursskamlunum.



*Jákup Anthoniussen, stigtakari saman við Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharra.*



*Forkvinnan í Havnar badmintonfelag, Bjørg Djurhuus handaði Klaksvíkar badmintonfelag gávu.*